## Viðmerkingar frá Starvsstovuni

Sosialurin royndi í morgun at fáa viðmerkingar frá Andriasi Petersen á Fiska- og Djórasjúkudeildini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um kunngerðirnar, sum vit umrøða á hesi opnu. Men Andrias sat á fundi, og tað gjørdi stjórin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Bárður Enni, eisini. Vit fara tó at venda aftur til hesar kunngerðir og fara at spyrja Andrias Petersen, hvat tær í veruleikanum merkja fyri flutning, aling, kryvjing, virking og goymslu av alifiski.



# Kryvjing og virking av alifiski er brot á galdandi kunngerð



**Sambært kunngerðum, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan vísir til, kann virking av aldum toski bert fara fram á ógvuliga fáum virkjum í Føroyum, tí hesi skulu í minsta lagi liggja 2,5 kilometrar frá verandi aliøkjum**

ALING/VIRKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú fyrsti aldi toskurin, sum ávikavist verður aldur á Árnafirði og í Hvalba, er tikin, ger Heilsufrøðiliga Starvsstovan á síni heimasíðu greitt, hvørji veteriner krøv eru galdandi til virking av hesum fiski.

- Fyri alivinnuna sum heild eru hetta vælkend krøv, sum komin eru seinastu árini, nú alivinnan er bygd uppaftur eftir stóru trupulleikarnar við ILA-sjúku. Hinvegin eru helst mong, sum ikki vita, at nærum somu krøv eru galdandi fyri virking av aldum toski, sigur stovnurin.

### Góðkendur flutningur

Á heimasíðuni sigur Heilsufrøðiliga Starvsstovan, at áðrenn Fiska- og Djórasjúkudeildin kann geva loyvi til, at alifiskur verður fluttur av aliøkjum til sláturvirki og víðari til onnur virki til góðskingar ella goymslu, verður í fyrsta lagi hugt at flutninginum.

- Hugt verður eftir, at flutningurin millum virkini verður framdur av góðkendum flutningsfyritøkum og við góðkendum flutningseindum.

Í sambandi við henda flutning verður víst til eina kunngerð, sum er nr. 98 frá 8. juli í 2003 um flutning av akvakulturdýrum v.m.

- Høvuðsendamálið er at syrgja fyri, at flutningseindirnar eru reinar og væl egnaðar til flutningin, og at eingin væta kemur frá flutninginum, sum kann føra til spjaðing av møguligari fiskasjúku, sigur Heilsufrøðiliga Starvsstovan.

### Virkir og goymsla

Men eitt er sjálvur flutningurin, annað er virking og goymsla av alifiski.

- Her verða krøv sett til uppsamling og sóttreinsan av frárensluvatni. Einki vatn skal renna frá virkinum ella økinum uttanum – uttan, at frárensluvatnið fyrst er vorðið filtrerað og sóttreinsað eftir góðkendari mannagongd og við góðkendari útgerð.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan vísir á, at krøv eisini verða sett til slúsu, soleiðis at minkað verður um smittuvandan frá virkjum sum best.

Stovnurin vísir í hesum sambandi til krøv í kunngerð nr. 72 frá 26. juli 2002 um sóttreinsing av frárensluvatni frá akvakulturbrúkum og akvakulturvirkjum v.m.

### Hert eftirlit

Á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni verður dentur lagdur á, at Fiska-og Djórasjúkudeildin skal góðkenna virkini, áðrenn tey fara í gongd við at arbeiða aldan tosk – og eisini áðrenn tey kunnu hava hann á goymslu.

- Hesi krøv eru eisini galdandi fyri innfluttan aldan tosk, leggur stovnurin aftrat.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan sigur, at tey framyvir fara at herða eftirlitið við innflutningi av aldum fiski, soleiðis at hesin verður fluttur og virkaður eftir galdandi treytum.

Virkir, sum ætla sær undir at arbeiða aldan tosk, skulu liggja í minsta lagi 2,5 kilometrar frá verandi aliøkjum (sí viðlagda kortið).

### Sker út í papp

Í grein 9, stk. 2 í galdandi




*Hetta kortið, sum er at finna á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, lýsir 2,5 kilometra fjarstøðuna frá verandi aliøkjum, har eitt nú aldur toskur ikki má virkast*